# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fimm heiðursmerki fyrsta dagin

**Føroysku fimleikararnir gjørdu alt fyri eitt vart við seg, tá fimleikaoyggjaleikirnir byrjaðu í gjár**



*Føroysku fimleikakvinnurnar vunnu bronsu í liðkappingini. Men munurin upp til næstu londini var sera lítil*
*savnsmynd*

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fimleikur er ein av kappingargreinunum, sum Føroyar vanliga hava staðið seg væl í á oyggjaleikum. Á Rhodos var fimleikurin tó ikki millum greinarnar, sum kappast varð í, og tí hava ymsu fimleikasambondini gjørt av at halda serstakar fimleikaoyggjaleikir. Nakað sum eisini varð gjørt í 1999, tá fimleikur heldur ikki var á skránni.

Kappingin verður hildin á Man, har føroyskir fimleikarar upplivdu satt gullregn fyri seks árum síðani. Og tó at ikki alt er gull, sum glitrar, so gjørdist talan um hópin av heiðursmerkjum fyrsta dagin.

## Silvur til kvinnurnar

Fyrsta kappingin var liðkappingin hjá kvinnum, og her vóru føroysku vónirnar góðar. Bermuda hevur verið rættiliga sterkt á seinastu tveimum oyggjaleikunum, men bæði Isle of Man og Føroyar porógvaðu avgjørt, at gullið ikki skuldi fara fyri einki.

Tað gjørdist tó Bermuda, sum streyk avstað við sigrinum, men munurin var tó ikki stórur. Caribisku genturnar fingu samanlagt 101,018 stig framman fyri Isle of Man við 100,584 stigum og Føroyar, sum vunnu 100,135 stig.

Tær, sum mannaðu føroyska liðið, vóru Kristine Toftegaard, Elinborg T. Durhuus, Brim H. Hoydal, Sonja Joensen, Silja Højgaard og Anita Knudsen.

## Gull til Gutta

Seinni á degnum var einstaklingakappingin hjá monnum á skránni. Besta føroyska hálið her gjørdi Gutti Harryson, sum vann gull, tá kappast varð í ringunum.

Og eisini gjørdist talan um onnur heiðursmerki. Rósing Dam vann silvur í kappingini á gólvinum, og í lopi vunnu Føroyar bæði silvur og bronsu. Øssur D. Eiriksfoss vann silvur og Fróði Mortensen bronsu.

# Serbi skal styrkja TB

**Krzysztof Popczynski er settur sum venjari hjá TB, har málið enn er at vinna sær uppflyting í Formula-deildina. Hartil kemur nýggjur spælari til felagið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað ljóðaði alla seinastu viku, og nú er tað ein veruleiki. TB hevur gjørt avtalu við frákoyrda HB-venjaran, Krzysztof Popczynski, um at hesin skal vera venjari hjá felagnum restina av hesum kappingarárinum.

- Í fyrsta umfari fevnir avtalan bert um tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum. Men vit hava avtala, at partarnir síðani taka upp samráðingar um komandi kappingarár, sigur Jóan Petur Olgarsson, formaður í TB.

Hann leggur afturat, at málið í fyrstu atløgu er at vinna seg upp millum tey bæði bestu liðini í 1. deild, soleiðis at uppflytingin til Formula-deildina kann gerast veruleiki. Eitt mál, sum tó ikki verður lætt at røkka, nú TB er 15 stig aftan fyri FSV, sum liggur nummar tvey. TB hevur tó ein dyst til góðar.

- Men í øðrum lagi er málið so sjálvandi eisini at byggja liðið upp til komandi ár, og vit ivast ikki eina løtu í, at nýggi venjarin er rætti maðurin til hetta, sigur Jóan Petur.

## Nýggjan spælara

Umframt venjaran, so váttar Jóan Petur eisini, at ein nýggjur spælari helst kemur afturat til TB.

Hesin eitur Sasa Jovanovic, og hevur higar til spælt fyri FC Radnicki í næst bestu serbisku deildini. Tað er nakað síðani, at avtalan millum TB og spælaran varð gjørd, men enn eru formligu loyvini um arbeiði og uppihald ikki komin upp á pláss, sigur Jóan Petur Olgarsson.



*Sasa Jovanovic eitur maðurin, sum í heyst skal styrkja um TB-liðið, sum framvegis ikki hevur givið upp vónina um at spæla Formula-bólt komandi kappingarár*
*Mynd: Aleksandar Djorovic*